# 1 Broytingar í galdandi rundskrivi um nýtslu hjá landsstovnum av gjaldskorti

## 1.1 Rundskrivi fevnir nú bæði um gjaldskort og kredittkort

Fleiri orsøkir eru til, at rundskrivið um gjaldskort o.tíl. verður broytt. Ein teirra er, at nýggja rundskrivi eisini fevnir um tey kredittkort, sum almennir stovnar hava útvegað starvsfólki sínum. T.e. tá ið gjaldið fyri nýtsluna av kredittkortinum fer av eini bankakontu, sum almenni stovnurin varðar av.

## 1.2 Loyvt at taka út reiðan pening við gjaldskorti til stovnskassan

Ein onnur orsøk til dagføra rundskrivið er, at higartil galdandi rundskrivi sigur, at loyvt er ikki at taka út pening við gjaldskortinum. Nú ið skipanin við postávísingum er dottin burtur, hevur tað verið neyðugt hjá fleiri stovnum at fáa sær peningastovnskontu fyri at fáa pening fyltan á forskotskassan. Av tí at tað ikki altíð ber til at taka út pening í peningastovni, er gjaldskortið ein møguleiki at taka pening út, tá ið peningastovnarnir hava latið aftur.

## 1.3 Bannað at nýta gjalds- ella kredittkorti privat

Harafturat verður hildið, at tað ikki gongur nóg greitt fram, at tað er bannað at nýta gjalds- ella kredittkort privat, hóast áseting er í galdandi rundskrivi um, at stovnsleiðari, ið verður varugur við mísnýtslu, kann taka loyvi at hava gjaldskort aftur. Í dagførda rundskrivinum verður sagt beinleiðis, at tað er bannað at nýta gjalds- og kredittkort privat.